**Býráðsfundur mánadagin 30. august 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen, Hans M. møtti frá máli nr. 3.

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| | **Ógegni: Tollakur Joensen í máli nr. 6 og Joen Magnus Rasmussen í máli nr. 12** | |
| 1. | **10/00337**<br>**Umsókn um loyvi at seta meir útgerð upp til 3 G net (Føroya Tele)**<br>Umsóknin fevnir um útbygging av netinum á fylgjandi økjum:<br>Leirvík – mastur á havnalagnum<br>Norðagøtu – við tunnilsmunnan<br>Syðrugøtu – á matr. nr. 70 g<br><br>**Tekniska nevnd mælir til at geva Føroya Tele loyvi at seta upp meira útgerð sambært umsókn** | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |
| 2. | **10/00362**<br>**Umsókn frá Erik Lervig um at byggja altan á norðursíðu við frávik.**<br>Umsóknin fevnir um altan ið verður bygd nærri grannamarki enn 2,5 metur. Grannin hevur játtað loyvið, tí at altanurin stendur meir enn 5,0 metur frá sethúsinum. Harumframt verður frávikið tinglisið við treytum um ábyrgd og krav um hvør ber kostnaðin og hvørjar treytir eru galdandi um grannin skal byggja suðureftir á stykkinum og fráleikin til altanin verður stytri enn 5,0m<br><br>**Tekniska nevnd mælir til at geva byggiloyviðtreytað av, at tinglýstur servituttur verður gjørdur millum matriklarnar (eigararnar), ið bindir eigarin av matr. nr. 347ee at halda seg til byggisamtyktina og brunakrøvini til grannamarkið og ber kostnaðin av hesum.** | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |
| 3. | **10/00364**<br>**Umsókn frá Jógvan á Húsamørk um byggiloyvi til høsnarhús.** | Einmælt samtykt at senda málið til náttúrufriðingarmyndugleikarnar, samsv. kunngerð nr. 57 frá 27.04.2001, innan býráðið viðgerð byggiloyvi. |

**Býráðsfundur mánadagin 30. august 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen, Hans M. møtti frá máli nr. 3.

**4. 10/00320**

**Umsókn um at seta upp eitt parabolnet**

Poul Henning Jacobsen, ið eigur matr. nr. 215m á Gerðavegi hevur sent umsókn at gera eitt parabol net, har 3 parabolskermar skulu setast upp á fríðøkið (øki F er frítíðar-øki) omanfyri matr. nr. 215o (Heidi og Jan Heinesen).

Ásetingarnar fyri **frítíðarøkið F** eru:
Økið verður lagt av til ítróttarvallir, spælipláss, útiverupláss o.t.

Innan fyri økini mugu bara verða gjørd virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarandi økispørtum og tí tænastuvirksemi, ið hevur samband við tey.

Hús kunnu bara verða bygd eftir byggiætlan, sum býráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað størri økið.

**Tekniska nevnd mælir frá at geva loyvið til at seta upp parabol, við tí grundgeving at økið er lagt út sum frítíðarøki F, ið er øki sum er lagt út til ítróttarvallir, spælipláss, útiverður o.t.**

Einmælt samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd.

**5. 10/00341 og 10/00336**

**Kæra viðv.garði á matr. nr. 22 í Syðrugøtu**

Petur Martin Johannesen sum eigur ognina matr. nr. 22 í Syðrugøtu, ið er samanbygd við Valhøll (dagrøktin í Gøtu), hevur kært ætlan kommununar at byggja garð til stovnin.

Kæran fevnir um fylgjandi:

1. At eigarin ongantíð er hoyrdur í hesum máli.
2. At kommunan ikki uttan víðari kann fremja tiltøk, ið eru sera avmarkandi fyri ognina hjá P.M.J.
3. At kommunan ætlar at gerða eina girðing móti tveimum síðum av

Einmælt samtykt at ganga kæraranum á møti viðv. hoyringsrættinum. Royna samráðing um hini viðurskiftini millum partarnar, tó við tí fyri eyga, at spælistovan fær eina rímiliga loysn.

**Býráðsfundur mánadagin 30. august 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen, Hans M. møtti frá máli nr. 3.

húsinum hjá P.M.J.

4. Krevur at arbeiði steðgar til P.M.J. hevur fingið fult innlit og havt málið til partshoyringar – arbeiði er støðga.
5. Ynskir eina óhefta meting av, um tað er rímuligt, at Eysturkommuna fremur slíka bygging kring ognina.

**Tekniska nevnd mælir til at býráðið fyrst tekur støðu til hvat og hvørjar ætlanir eru við Valhøll og uttanumøkið í framtíðini.**

**6. 10/00339**

**Avkláran av ognarviðurskiftunum á kappróðrarneystinum á matr. nr. 170 og 171 a í Norðragøtu**

Eysturkommuna hevur fingið eina frágreiðing undirskrivað av 21 persónum í samband við ognarrættinum til neystini á matr. nr. 170 og 171a í Norðragøtu.

Sambært Tinglýsingini stendur P/F Stórnótaneysti sum eigari av matr. 170.

Sambært Tinglýsingini stendur eingin sum eigari av matr. nr. 171a.

Hesir 21 persónar hava ynski um, at omanfyri nevndu neyst verða ogn hjá Eystur-kommunu, men við teirri treyt, at hesi fyrst og fremst kunnu standa kappróðrarungdómi í kommununi í boði.

Sambært matrikuldómi ið er fallin 22. apríl 2010 er matr. nr. 170 og matr. nr. 171a ogn kommununar. Sambært matrikuldóminum er málið avgreitt.

Einmælt samtykt at taka søguna og støðuna til eftirtektar, at kommunan er ánari av hesum ognum. Kommunan er sinnað, at viðgera at hýsa kappróðrabáti um tann tíð kemur.

**7. 10/00371**

**Samanlegging av bókasøvnunum í Gøtu og Leirvík**

Trivnaðarnevndin mælir til at bókasøvnini í Gøtu og Leirvík verða løgd saman til eitt fólkabókasavn og fær eitt nýtt heiti. Hetta verður gjørt við heimild

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 30. august 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen, Hans M. møtti frá máli nr. 3.

í Løtingslóg nr.79 fra 08. mai 2001 um Bókasøvn, grein 12, stk. 6.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarnevndini.

**8.** **10/00376**

**Keyp av telduútbúnaði.**
Fíggjarnevndin mælir til at taka av fyriliggjandi tilboði frá Elding á kr. 59.391,00 við mvg.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinumhjá fíggjarnevndini. Peningurin verður ávístur av kta. fyri telduútbúnað.

**9.** **10/00377**

**1.viðgerð av eykajáttan til íløgu í frítíðarheimið (gomlu kommunuskrivstovuna í Leirvík) á kr. 250.000,00**
Í sambandi við frítíðarheimini í Leirvík og Gøtu eru løgd saman í eitt, hevur verið/verður neyðugt at gera nakrar íløgur á gomlu kommunuskrivstovuni. Upplýst varð um hetta, tá málið varð fyri á býráðsfundi tann 21. apríl 2010.

**Borgarstjórin mælir til at játta 250.000,00 kr. og at peningurin verður tikin av konto 4.23.22.511 (íløgu í skúlan).**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá borgarstjóranum.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini við hesi viðgerð.

**10.** **10/00384**

**Framtíðar mentanarpolitikkur í Eysturkommunu.**

Einmælt samtykt, at Tr.N. til næsta fund kemur við einum uppleggi til hvussu farið verður víðari.

**11.** **10/0381**

**Val av fíggjarnevnd**
Fríðgerð Heinesen hevur boðað frá, at hon ikki longur ynskir at verða limur í fíggjarnevndini, og hevur heitt á borgarstjóran um at velja fíggjarnevndina av nýggjum.

Semja gjørdist um, at fíggjarnevndin heldur fram óbroytt.

**Býráðsfundur mánadagin 30. august 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen, Hans M. møtti frá máli nr. 3.

**Mál 12 fyri afturlætnum fundi.**

**12. 10/00372**
**Asfaltering av Gerðavegi í Syðrugøtu**
Støðutakan til innkomin tilboð upp á asfaltering av Gerðavegi:

Tilboð komi frá:
HJ Asfalt
EM Asfalt
Kostnaðarm. EM Ráðgeving

Við gjøgnumgongd av alternativa tilboðnum skulu ymiskar broytingar gerðast, ið gerð at kostnaðurin til alternativa tilboðið verður mettur til 460.000,00 kr.

Tekniska nevnd mælir til at taka av tilboðnum hjá HJ Asfalt við broytingunum og ein samlaðan kostnað upp á kr. 460.000,- uttan mvg og at peningurin verður tikin av konto 6.22.11.510 (Byggibúning)

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

Fundur lokin: kl. $23.^{00}$

Tilráðingin hjá teknisku nevnd og fíggjarnevnd varð einmælt samtykt

## Býráðsfundur mánadagin 30. august 2010 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen, Hans M. møtti frá máli nr. 3.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Terji Lervig ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Fríðgerð Heinesen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Joen Magnus Rasmussen ______________________________

Elin Vatnhamar ______________________________